


**MÁLSTRÍÐ**

Skal nýggja atlassið brúka nøvn sum »Borgundarhólmur«, »Ukreina«, »Grønhøvdaoyggjar«, ella skal minsta kravið vera, »at bókaverkið livir upp til vanligt skilvísi«. Tað vil Bjarni Djurholm, løgtingsmaður, hava Helenu Dam á Neystabø at greiða tinginum frá

# Nú kemur atlassið í Løgtingið

**NÝTT ATLAS - Tað má vera eitt minstakrav, nú tað almenna aftur fíggjar útgávu av nýggjum atlassi, at tað livir upp til vanligt skilvísi, heldur Bjarni Djurholm, sum nú reisir málið um nýggja atlassið á tingi**



Á tingfundinum mikudagin fer Bjarni Djurholm at seta Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu í mentamálum, munnligan fyrispurning um nýggja føroyska atlassið, sum Skúlabókagrunnurin fer at geva út

Eirikur Lindenskov

Á tingfundi mikudagin fer Bjarni Djurholm, løgtingsmaður, at seta Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu í mentamálum, ein munnligan fyrispurning um nýggja atlassið. Hann vil hava hana at greiða løgtinginum frá, hvørjar málsligar leiðreglu fara at verða grundarlagið undir nýggja atlassinum. Víðari spyr Bjarni Djurholm:

**– Tað má vera minstakrav, nú tað almenna aftur fíggjar útgávu av nýggjum atlassi, at bókaverkið livir upp til vanligt skilvísi, har úrslitið er eitt verk, sum ikki gerst ein trongi fyri vitan**

- Fer ritstjórnin at til fulnar nýta bókstavirnar c,q,w,x og z soleiðis, at tað aftur verður samsvar millum stavseting og tey heiti, sum navnagávan (lond, býir o.s.fr.) hevur frá uppruna, og soleiðis sum tey verða nýtt í okkara parti av heiminum?

- Tekur landsstýriskvinnan undir við, at navnagávurnar í atlassinum sum høvuðsregla skulu skrivast soleiðis, sum vanligt er í ymsu londunum (og soleiðis sum vit eisini vænta, at onnur skriva okkara staðarnøvn)?

Bjarni Djurholm vísir á, at í fjør bjóðaði ritstjórnin av nýggja atlassinum hugaðum og almenninginum annars at gera viðmerkingar til nýggja heimsatlassið við teirri staðfesting, at ætlanina var at geva út verk, sum m.a. málsliga og landafrøðiliga fór at vera í samljóði við veruleikan vit øll liva í og eru partur av.

- Hetta sýntist skilagott, men sum fráleið kendist rákin aftur av málfatanini, sum var vøllurin undir fyrru útgávuni - at ávísur hugburður aftur fór at mynda nýggju útgávuna, sigur Bjarni Djurholm.

Hann vísir á, at tað nú verður hildið uppá, at tað bert eru eini fimm, seks heiti, sum lýta verandi atlass. Men hetta heldur hann vera ein sannleika við viðfevndum modifikationum, og sum gevur frænir av, at ætlanin er at halda fram eftir gamla leistinum í nýggja atlassinum.

- Øll konstrueraðu nýyrðini í gamla atlassinum, frá gerandishugtøkum til staðarnøvn, har upprunin tykist at vera at sleppa av við partar av latínska alfabetinum og smíða nýgg orð og hugtøk, tarna smidligari innlæring, eru ein fótongul í leitingini á internetinum og forðan fyri optimalari fatan av sjónvarpstíðindum, sum áhaldandi floyma úr alheiminum umvegis elektronisku miðlarnar, sigur løgtingsmaðurin.

Hann heldur tí, at tað má vera minstakrav, nú tað almenna aftur fíggjar útgávu av nýggjum atlassi, at bókaverkið livir upp til vanligt skilvísi, har úrslitið er eitt verk, sum ikki gerst ein trongi fyri vitan, men harafturímóti verður ein kelda til víðskygni, lærdóm og kunnleika.

## Spurningarnir til Helenu:

- Hvørjar málsligar leiðreglur fara at verða grundarlagið undir nýggja atlassinum?
- Fer ritstjórnin at til fulnar nýta bókstavirnar c,q,w,x og z soleiðis, at tað aftur verður samsvar millum stavseting og tey heiti, sum navnagávan hevur frá uppruna, og soleiðis sum tey verða nýtt í okkara parti av heiminum?
- Tekur landsstýriskvinnan undir við, at navnagávurnar í atlassinum sum høvuðsregla skulu skrivast soleiðis, sum vanligt er í ymsu londunum?